# Nógv søvn í Reykjavík...

Íslendski høvuðsstaðurin íður í søvnum. Her skulu nevnast nøkur teirra. Tjóðarsavnið, ið hevur oman fyri 16.000 lutir, ið geva teimum vitjandi eitt góða mynd av, hvussu lívið í Íslandi var frá víkingatíðini fram til okkara dagar. Eitt annað savn eitur rætt og slætt Safn, ið hevur sera góða privatsamling við verkum eftir millum øðrum Donald Judd, Carl Andreé, Ilya Kabakov, Dieter Roth og Ólafur Eliasson. Verk, sum listarfólkini í nógvum førum hava latið eigarunum í sambandi við framsýningar og vitjanir. Savnið fyri samtíðarlist, Nýlistasafnið, varð sett á stovn í 1978 av lokalum listarfólkum. Síðani tá hevur hetta verið eitt tað mest týðandi framsýningar- og upplýsingarstað í Íslandi fyri nýmótans list. Eitta annað savn er Listasafn Einars Jónssonar, ið er uppkallað eftir kenda myndahøggaranum, ið livdi frá 1874 til 1954. Hann gav í 1914 íslendska ríkinum nógv av sínum verkum treytað av, at savnið varð uppkallað eftir honum. Savnið lat upp í 1923.

*Listasavn Íslands liggur beint við Tjørnina í Reykjavík*






















